# Suðuroyingar vísa sína ónøgd við undirskriftum

**Í Suðuroynni er ónøgdin stór við viðferðina, sum ferðafólk um Suðuroyarfjørð fáa frá Strandferðsluni og avvarðandi myndugleikum. Nú síggjast fyrstu mótmælini**

SAMFERÐSLA
*Dagfinn Olsen*

Túnatosið í Suðuroynni í dag er nærum bert um tað vána viðferð, ið suðuroyingar meta seg fáa frá Strandferðsluni, nú Scania er er tikin úr aftur siglingini til Suðuroyar. Ferjan skuldi avloysa, nú Smyril er í dok.

Men skipið vísir seg ikki at hóska ella klára túrin. Ístaðin er Dúgvan nú avloysaraskip. Hetta er ónøgdin stór við í Suðuroynni.

## Savna undirskriftir

Lærarar í Suðuroynni hava nú orðað mótmælisskriv. Lærarar við Vágs Skúla og lærarar á Tvøroyri mótmæla framferðini viðvíkjandi suðuroyarleiðini.

Dúgvan hevur áður víst seg at klára túrin til Suðuroyar illa. Var m.a. í havsneyð fyri fáum árum síðani í Suðuroyarfirði, verður víst á í mótmælisskrivinum.

Sum skilst, er ónøgdin stór í Suðuroynni. Bilar sleppa nærum ikki við um fjørðin og siglingstíðin er munandi longd henda langa teinin.

Enn er ikki avgjørt, um farið verður at savna fleiri undirskriftir.

Mótmælisskrivið, ið er orðað og undirskrivað av lærarunum, er sent fjølmiðlum, myndugleikum, Strandferðsluni og tingmonnum og kommunum í Suðuroynni



*Suðuroyingar hava savnað undirskriftir, fyri at mótmæla ringu ferðaviðurskiftini um Suðuroyarfjørð*

# Konsert umborð á Høganesi

TÍÐINDASKRIV
*Tónasjón*

Nú fríggjakvøldið 24. mai verður aftur konsert umborð á sluppini »Høganesi« í Runavík. Bólkarnir, ið fara at spæla, eru »Í Eb-inum« og »Tourist«.

»Í Eb-inum«, sum í komandi viku fara í upptøkuhøli at taka upp eina nýggja fløgu, eru Heðin Ziska Davidsen, ið spælir el-gittar, Mikael Blak, ið spælir kontrabass, Óli Olsen, ið spælir Fender Rhodes (el-klaver), og Brandur Jacobsen, ið spælir trummur. Hesir tónleikarar eru allir kendir úr mongum ymiskum bólkum og tónleikaligum sambondum, eitt nú »Hatespeech«, »Shalder Geo«, »Ivory«, »Clickhaze« og »Enekk«. Tónleikurin hjá »Í Eb-inum« er heimagjørdur; serliga er tað gittarleikarin Heðin Z. Davidsen, ið hevur gjørt løgini, ið bera dám av jazzi, rokki og øðrum.

Bólkurin »Tourist« er rættiliga nýggjur. Teir, ið manna bólkin, eru eysturoyingarnir Ólavur Hansen, sang og kassagittar, Torfinnur Jákupsson, el-gittar, Knút Eysturstein, ljómborð og Jens L. Thomsen, bass, og havnarmaðurin Brandur Jacobsen, trummur. Stílurin hjá »Tourist« sigst vera skyldur nakað við nøvn sum Jeff Buckley, Muse, Radiohead og onnur. Fleiri av tónleikarunum í »Tourist« eru kendir úr øðrum bólkum; Knút spælir í Marigold, Jens spælir bass í »Clickhaze« og Brandur, trummuleikarin, sum fyri stuttum gav egna fløgu út við heitinum »Seventh Heaven«, spælir í mongum ymiskum bólkum, eitt nú »Ivory« og »Yggdrasil«.

Konsertin umborð á »Høganesi« fríggjakvøldið 24. mai byrjar klokkan 21.00.







































